Høgni var stóri vinnarin

Høgni R. Øster úr Havn fór avstað við øllum gullinum í mannfólkarøðini, tá FM í amboðsfimleiki fyri vaksin var á skránni um vikuskiftið

FIMLEIKUR
Jákup Mørk

Hetta vikuskiftið varð FM-kappingin í amboðsfimleiki fyri vaksin hildin í Havn.

Hjá monnunum hevur spenningurin ofta verið stórur fyrr, men hesaferð var eingin ivi. Høgni R. Øster, sum eisini varð mettur sum favoritturin undan kappingini, og hann livdi eisini upp til hetta við at vinna allar kappingarnar.

Tá samlaða støðan skuldi gerast upp, hevði Høgni 25,600 stig. Nummar tvey varð Rósing Dam - eisini úr Havnar Fimleikafelag - við 23,350 stigum, og á triðja plássi kom Johnleif Højgaard við 23,300 stigum.

Í bólki 3 hjá dreingjum vóru tríggir luttakarar. Øssur D. Eiriksfoss úr HF vann við 23,250 stigum. Jóni B. Christiansen úr HF fekk 19,800 stig, og Jákup Debus úr Støkk fekk 19,500 stig.

Høgni R. Øster gjørdist stóri vinnarin í mannfólkarøðini, tá FM-kappingin í amboðsfimleiki varð hildin um vikuskiftið

Spennandi hjá kvinnunum

Hjá kvinnunum var talan hinvegin um veruligan spenning.

Ikki færri enn fýra gentur endaðu javnar í bólki 3 fyri kvinnur, og fingu tær allar fýra gullmerki.

Silja Højgaard úr Støkk, Annika Dimon úr Havnar Fimleikafelag og Elinborg Durhuus og Brim H. Hoydal úr Ljósinum høvdu allar 25,800 stig, tá talt varð saman.

Hjá teimum vaksnu kvinnunum varð Anita Knudsen úr Støkk ikki óvæntað fremst. Hon fekk tilsamans 23,120 stig. Nummar tvey varð Sonja Joensen úr Støkk, sum fekk 21,975 stig, og á triðja plássinum kom so Birita Dal-Christiansen. Hon fekk 20.050 stig.

Kappróður á Strondum

Leygardagin var útsetti kapprórðurin á Strondum avgreiddur.

Hetta var róðurin, sum av røttum skuldi vera á bygdarstevnuni seinasta vikuskiftið, men tá viðraði so illa, at hann varð avlýstur.

Men hesa ferð varð róðurin so avgreiddur í øllum góðum

Tilsamans róðu 40 bátar á Strondum og teir hava kanska fingið eina ábending um, hvussu væl teir eru fyri, nú FM róðarnir byrja á Norðoyastevnu

Fimmmannafør, gentur (barnaróður)
1 Ørnin 3.17, 24
2 Tekla 3.18, 05
3 Dúgvan 3. 30, 10
4 Ørnin 3.17, 24
5 Strípan 3.46, 19

Fimmmannafør, dreingir (barnaróður)
1 Fípan Fagra 3.01, 06
2 Súlan 3.19, 12
3 Ritan 3.25,18
4 Strípan 3.32.16

Fimmmannafør við gentum
1 Blikur 6.18, 13 min
2 Tekla 6.24, 05
3 Tjaldrið 6.32, 22
4 Erla Kongsdóddir 7.11 18

Fimmmannafør við kvinnum
1 Sílið 5.53,22
2 Blikur 5.59, 15
3 Fípan Fagra 6.03,18
4 Drekin 6.06, 01
5 Junkarin 6.07, 13
6 Ritan 6.13, 15
7 Firvaldur 6.17, 03
8 Ørnin 6. 23, 04
9 Kollur 6.31. 13

Fimmmannafør við Dreingjum
Í hesum róðrinum eru ongar tíðir, tí dómararnir høvdu tekniskar trupulleikar
1. Sílið
2. Fípan Fagra
3. Ritan
4. Blikur
5. Tjaldrið
6. Tekla

Seksmannafør við kvinnum
1. Lómur 5.51, 11
2. Sólmundur 6.17, 03

Seksmannafør við monnum
1. Sundabáturin 8.28, 19
2. Jarnbardur 8. 38, 01
3. Strálan 8. 38,10
4. Sølmundur 8.42, 02
5. Lómur 8.45, 11
6. Stjórnan 8.47, 05
7. Víkingur 8.48, 15
8. Páll Fangi 8.54, 19
9. Kollfirðingur 9.13, 04
10. Fuglfirðingur 9. 40, 12

Àttamannafør
1. Nevið Reyða 7. 39, 04
2. Kvívíkingur 7. 44, 11
3. Argjabáturin 7.55.17
4. Tofta Regin 8. 00, 10
5. Árnfirðingur 8.09, 16
6. Miðvingur 8. 10, 17

10- mannafør
1. Nólsoyingur 7. 28, 22
2. Hoyvíkingur 7.33, 19
3. Skálabáturin 7.46, 02

Taptu fyri meistarunum

Rógvi Jacobsen og liðfelagarnir í KR spældu mánakvøldið á heimavølli móti íslendsku meistarunum úr FH.

Sagt varð undan dystinum, at hetta kanska var ein tann týdningarmesta royndin hjá KR á árinum, og í so máta dumpaðu Rógvi og teir. Tað eydnaðist nevnliga meistaraliðnum at vinna dystin 1-0, og soleiðis hava teir higartil í ár lagt seg trygt á odda við 12 stigum eftir fyrstu fýra umførini.

FH fekk einasta málið stutt undan hálvleiksstøðginum, og so megnaði KR ongantíð at svara aftur av álvara.

Hetta var næsta tapið hjá KR í ár, og liggja teir nú miðskeiðis á stigatalvuni við seks stigum fyri fýra dystir.

-jm

Bílig atgongumerki til Suðuroynna

Eitt av kjakevnunum upp til landsdystirnar móti Sveis og Írlandi hevur verið ferðaætlanin hjá Smyrli. Ivamálið hevur her verið, hvørt talan fór at gerast um eykatúrar, og tí hava nógvir suðuroyingar aftra seg við at keypa atgongumerki til dystirnar.

Ikki fyrr enn beint undan vikuskiftinum var greitt, at eykatúrur kortini verður gjørdur, og fyri at leingja um skotbráðið hjá suðuroyingum hevur FSF nú gjørt av at leingja tíðarskeiðið fyri forsøluna í Suðuroynni.

- Vit hava gjørt av, at suðuroyingar sleppa at keypa til forsøluprísin fríggjadagin. Tað halda vit vera bæði rætt og rímiligt, nú tey so leingi hava verið í iva um, hvørt tað skuldi bera til hjá teimum at ferðast til dystin og heim aftur sama dag, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF.

-jm

Zuma fer eisini úr FCK

Nú er greitt, at Todi Jónsson ikki verður einasti framherjin, ið ikki heldur fram í FC Keypmannahavn eftir summarsteðgin.

Suðurafrikanski Sibousisu Zuma er nevnliga komin ásamt við týska Arminia Bielefeld um ein sáttmála.

Zuma og Bielefeld eru komnir ásamt um ein trý ára sáttmála, og FCK fær sjey milliónir fyri at selja 30 ára gamla framherjan.

Íslendska Landsbankadeildin

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1 FH	4	4 - 0 - 0	12	1	11	12
2 Valur	3	3 - 0 - 0	7	2	5	9
3 Fram	3	2 - 0 - 1	6	1	5	6
4 Fylkir	4	2 - 0 - 2	7	5	2	6
5 KR	4	2 - 0 - 2	4	4	0	6
6 Keflavík	3	2 - 0 - 1	5	6	-1	6
7 ÍA	4	2 - 0 - 2	4	7	-3	6
8 Grindavík	4	1 - 0 - 3	6	12	-6	3
9 Þróttur	3	0 - 0 - 3	1	6	-5	0
10 ÍBV	4	0 - 0 - 4	3	11	-8	0

Føroyskir leikarar: Rógvi Jacobsen (KR)